# Stríð um Kampingpláss í Havn

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

Fyrst í februar í 1978 fór Jústinus Háskor í Havn undir at gera eitt kampingpláss við Víkavegin sunnan fyri nýggja kirkjugarð í Havn.

Sosialurin skrivar 22. februar í 1978, at Jústinus Háskor tó ikki hevur fingið byggiloyvi, og at hann 9. februar fekk bræv frá Petur Christiansen, borgarstjóra, har hann verður gjørdur varugur við, at hann grevur í jørð kommununnar.

Petur C gevur honum boð um at gevast og at seta alt í sama stand aftur, sum tað var, áðrenn hann fór undir arbeiðið.

Men Jústinus Háskor sigur við Sosialin, at hann metur seg at hva loyvi til at gera kampingplassi, og at hann ætlar sær ikki at gevast.

– Um tríggjar mánaðir byrjar millumlandasiglingin hjá Smyrli og Englandi, og talið av ferðafólki, sum kemur hendanvegin, verður neyvan minni í ár, enn árini frammanundan, sigur hann.

Tað er øllum kunnugt, at eingin hóskandi tjaldingarstaður finst í Havn, so spurningurin um eitt kampingpláss krevur eina skjóta loysn.

Áhugin hjá Jústinusi er kveiktur, tá hann hevur verið uttanlands og ferðast árini frammanundan. Hann søkti tí kommunua um loyvi at gera eitt kampingpláss, og 9. september í 1976 varð umsóknin viðgjørd á býráðsfundi og samtykt eftir tilmæli frá byggi- og býarskipanardeildini og teknisku deilt at gera fyrireikingar til eitt kampingpláss í samrá við Jústinus Háskor. Til endamálið varð víst á trøðna í Vika.

Men býráðið hevur um sama mundið søkt landsstýrið um eina trøð íti við Boðanes til sama endamál. Hesum noktaði landsstýrið fyri og friðingarnevndin mælti eisini frá at leggja kampingplássi á hesa trøð.

Jústinus Háskor fær eingi greið boð frá býráðnum, hóast hann fleiri ferðir rykkir eftir svari, og tí fer hann bara undir arbeiðið.

Jústinus hevur ætlanir um at nýta eitt øki, ið er um 14.000 fermetrar til víddar til kampingplássið. Hann ætlar í fyrstu atløgu at gera ein skúr við tveimum brúsum og køki og wc. Hann væntar, at pláss verður fyri 200 tjøldum á plássinum. Seinni ætlar hann at byggja einar 20 smáar smáttur á økið.

Petur C heldur, at Jústinus er lopin framav. Hann viðgongur, at málið hevur tikið drúgva tíð í býráðnum, men at tað nú liggur til góðkenningar í landsstýrinum, og hann væntar, at Jústinus fær svar innan tveir mánaðir.



*Erpnu steypavinnararnir í 1978: Frá vinstru: Heðin Joensen, Jákup Midjord, Eivind Sundstein og Erling Nielsen (seinni í Liða)*

# Yngstu leikararnir sýndu framúr gott spæl

Stórar vónir vórðu settar til yngru leikararnir hjá Havnar Badmintonfelag í 1978

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

Sosialurin skrivar 15. februar í 1978 um badminton, nú kappingin um meistaraheitið í Havnar Badmintonfelag er av.

Sagt verður, at síðani Havnar Badmintonfelag fór undir venjingar við yngur leikarunum, er tilgongdin til felagið vaksin nógv. Tað fóru tí fýra rættiliga stórir bólkar, teir vórðu býttir upp í eftir aldri.

Dreingir undir 12 ár var yngsti bólkurin, og vann Jákup Midjord í finaluni 11-3 og 11-2 á Petur Oluf Hansen.

Í bólkinum 12-14 ár vann Heðin Joensen í finaluni á Zacharias Thomasen við úrslitinum 11-5 og 11-7.

Av greingjum 14-16 ár vann Erling Nielsen (seinni í Liða) 15-0 og 15-10 í finaluni á Eivind Sundstein.

Elsti bólkurin av dreingjum, 16-18 ár, varð vunnin av Petur Lyngsø. Hann vann í finaluni 15-4 og 15-10 á Jógvan av Kák.

Doublekappingin fyri dreingir varð skipað soleiðis, at býtt varð sundur í tveir bólkar. Dreingir frá 10-14 ár og dreingir frá 14-18 ár.

Í fyrra bólkinum vunnu Heðin Joensen og Jákup Midjord í finaluni á Helga Nielsen og Boga Nielsen við úrslitinum 15-3 og 15-4. Í eldra bólkinum vunnu Erling Nielsen og Eivind Sundstein í finaluni á Petur Lyngsø og Theis Kjellberg. Úrslitið varð 15-10 og 15-9.

Sum rímiligt er, so vera teir eldru leikararnir, sum gjøgnum mong ár hava hildið felagnum uppi, verri og verri, meðan teir yngru nú rættiliga eru komnir fyri seg. At yngru leikararnir eru komnir so væl við nú, hevur serliga ta orsøk, at badmintonfelagið seinastu tvey árini hevur skipað fyri venjing fyri hesar. Úrslitið av hesum tiltaki sóu vit seinasta vikuskifti, og einki er at ivast í, at feliri av hesum dr4eingjum fara vit kunna rokna við í framtíðina, staðfesti Sosialurin fyri 25 árum síðani....

## EG MEINI TAÐ

# Ein lítil, ikki heilt ókend søga



*Rakel Helmsdal skrivar*

Tveir dreingir, ein stórur og ein lítil, eru vorðnir óklárir. Tann stóri ákærir tann lítla fyri at hava eina vatnbyrsu, sum hann er ov lítil at handfara (sjálvur eigur hann eina ørgrynnu av vatnbyrsum, men tað er ein heilt onnur søga.....) Tann lítli noktar blankt, - hann hevur onga vatnbyrsu! Ella í hvussu so er ikki størri enn hann hevur loyvi til í sínum aldri.

Tann stóri sigur, at sleppur hann ikki heim til tann lítla at kanna, um tað er satt, so fer hann at hølva hann av.

"Alt í lagi meðni," sigur tann lítli ræddur, "kom so og kanna!"

Tann stóri setir treytir: hann skal sleppa at leita allastaðni, hann vil ikki órógvast og hann skal hava kannað alt innan 2 tímar (hóast húsini allarhelst eru ov stór at kannað eftir bara tveimum tímum). Gongur tann lítli ikki undir hesar treytir, verður hann avhølvaður.

"Ja, ja, ja, tað er í lagi!" sigur tann lítli.

Tann stóri kannar nú húsini væl og virðiliga. Tíðin er knøpp, og hann finnur onki, kanska onkra tekning, tann lítli hevur gjørt av stórum vatnbyrsum, men onki annað.

Nú verður tann stóri argur, og sigur, at hann kortini fer at hølva tann lítla av. Hann hevur verið til hindurs, tá hann skuldi inn í eitt skáp, og skumpað undir hann, tá hann skuldi upp á loft! Tað, sum alt satt at siga snýr seg um, er at tann stóri hevur hug at hølva tann lítla av, sum, tá rætt skal vera rætt, altíð hevur verið heldur trælskur at hava við at gera.

Og hann samlar sær allar sínar vatnbyrsur, (sum hann ikki loyvir tí lítla at eiga) og onkrar stórar vinmenn, og ger seg til at leypa á, hóast aðrir vinir hjá honum halda, at hann eigur at kanna eitt sindur betur, og at nógvir vinir hjá tí lítla siga, at teir fara ikki at lata hetta um seg ganga.......

Ja, tað ljóðar næstan skemtiligt sagt sum á hendan hátt, men skemt er tað ikki! Hví viðgongur sjálvútnevndi heimsløgregluovastin Bush ikki bara, at hann vil sleppa at ráða fyri allari oljuni (og øllum øðrum við fyri tað) í heiminum, standast hvat av ið má? Ístaðin roynir hann at billa okkum inn, at hann er "áh, so" rættvísur og verjir okkum fyri tí ræðuliga Saddam og øðrum (líka ræðuligum?) muslimum. Kanska er tað ikki so løgið, tá man verður lagdur undir at vera fólkafíggindi nr.1, og samstundis ikki hoyrir til tann ríka og vælbjargaða partin av heiminum, at man verður heldur argur sum frá líður og sleppur eini bumbu á "passandi støðum", ella líkasum flýgur eini tvey flogfør inn í súmbóli fyri pengavaldið í heiminum.

Í "Gods own country" halda tey, at "med ondt skal ondt fordrives", og at tað meir enn so kann forsvarast at bumba ósekar irakar ella afganar fyri at raka ein einkultan oddafisk, hóast tað er ræðuligt at drepa ósekar amerikanarar av umleið somu orsøk. Har skilja tey ikki, at fyri eitt lík er tað líkamikið, um krútið tað doyðu av, var kristið ella muslimskt.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



# Hann situr næstan so eina

Ungdómurin í Vestmanna savnast í felagshølunum hjá Ungtemlarafelagnum Heyggi, tá tey eru liðug við ítróttin. Aðrastaðni er ikki at fara, og seinastu fýra - fimm árini hevur ein maður einsamallur rikið alt virksemið í felagnum



*Steingrím Haraldsen hevu seinastu fýra -fimm árini rikið virksemið í Ungtemplarfelagnum Heyggi í Vestmanna mestsum einsamallur. Hann hevur eisini staðið fyri umfatandi umvælingini av bygninginum*

*Mynd: Edvard Joensen*

FRÍTÍÐARLÍV

*Edvard Joensen*

**Vestmanna:** Tað er í felagshølunum hjá Heyggi, at ungir vestmenningar hittast í frítíðini, tá teir ikki eru í ítróttarhøllini. Og Ungtemplarafelagið Heyggur er í dag at meta við ein persón. Steingrím Haraldsen.

– Tað er nú ikki heilt rætt, vil hann sjálvur vera við. Tí hóast eg í løtuni eri einsamallur um tiltøkini í ungdómshúsinum, eru tað trý fólk, sum standa aftanfyri, sigur Steingrím. Hini bæði eru Torgerð og Steingrím Simonsen, hvør partur ikki liggur eftir.

Ungtemplarafelagið Heyggur er partur av føroysku fráhaldsrørsluni og varð stovnað fyri 21 árum síðani. Virksemið hevur verið svingandi, og tað hevur limatalið eisini, greiðir Steingrím frá.

Men tiltøkini eru fleiri í dag, enn tey nakrantíð hava verið, sigur hann. Tá byrjað vað, var opið tvey kvøld um vikuna. Nú er opið at kalla hvønn dag í árinum.

– Í fjør vóru bara 32 dagar alt í alt, tá húsið ikki var opið, sigur Steingrím Haraldsen. Og sjálvur er hann hvønn dag í húsinum. Vanliga er húsið opið frá klokkan 20 til umleið klokkan 23 á kvøldi. Um vikuskiftini kemur tó regluliga fyri, at opið er longri út á náttina.

### Samlast í Heyggi

Í Vestmanna er bara Heyggur at fara til, tá liðugt er í ítróttarhøllini, og tey ungu koma eisini trúliga í húsið, sigur Steingrím Simonsen.

Tilboðini eru slík, sum vanliga eru í sovorðnum húsum. Tað eru spøl av ymsum slagi, tey kunnu stytta sær stundir við, og so er øll tann tekniska útrgerðin, sum hoyrir degnum í dag til, eisini í húsinum. Her er stereoannlegg, um tey vilja dansa, her er sjónvarp við paraboli. Og her er stórskíggi, sum tey ofta brúka at hyggja at ymsum filmum á.

– Tað er heilt vanligt, at tey hava egnar ella leigaðar videofilmar við sær, tá tey koma higar, sigur Steingrím Haraldsen. Og so sita tey í felag og hyggja at hesum filmunum á stórskíggjanum.

Tað eru serliga ungfólk frá umleið 13 til 18 ára aldur, sum koma í felagshølini hjá Heyggi. Tá tey verða eitt sindur eldri, vísa royndirnar, at tey fara aðrastaðni. Helst fara tey til Havnar at stuttleika sær, heldur Steingrím.

Men so vísir tað seg kortini, at fleiri koma aftur, soleiðis at tað eisini regluliga koma fólk millum 18 og eini 20-22 ár í hølini, sigur hann.

– Tað ber ikki til at hava dans hvørja viku, men soleiðis aðruella triðjuhvørja viku, ber til, og tað plaga vit eisini at hava í Heyggi, sigur Steingrím. Tað er neyðugt at laga seg eftir tiltøkum aðrastaðni, eitt nú tí, sum hendir í Havn.

Vestmenningar hava í áravís havt møguleika at koyra við náttbussi til Havnar at dansa. Men tað heldur Steingrím ikki hevur ávirkað tað, sum hendir í hølunum hjá Heyggi, stórvegis.

– Vit síggja eisini, at tað kemur fólk aðrastaðni frá til Vestmanna at dansa, tá vit hava eitt nú diskotek í húsinum. Eisini »langvegis«, um vit kunnu siga so um strandingar og runavíkarfólk, sigur hann.

### Umvæling

Tað er gamla dansistovan í Vestmanna, sum Heyggur keypti í síni tíð, ið húsast verður í.

Húsini hava seinastu fýra árini ella so verið ígjøgnum eina størri umvæling, sum Steingrim Haraldsen eisini hevur staðið fyri. Men farið varð ikki undir at umvæla húsini, fyrr enn Heyggur hevði goldið tað, tey kostaðu at keypa.

Steingrím Haraldsen sigur, at tey hava møtt vælvild ymsastaðni frá í samband við ta umvæling, sum gjørd er, hóast ikki allar umsóknir kortini hava verið møttar við líka stórari vælvild. Men Vestmanna Kommuna hevur verið sera lagalig at heitt á. Sovorðið sum lán av maskinum og amboðum fyri einki. Tilfar og peningaligan stuðul hava tey eisini fingið ymsastaðni frá, og tað lættir sjálvandi um. Men kortini er nógv, sum er keypt og skal gjaldast aftur.

Húsið er klætt uttan, og sera nossligt tún er gjørt niðanfyri, har til ber eitt nú at hava úticafé um summarið. Pláss man vera fyri einum 100 fólkum, um tað skuldi verið, metir Steingrím. Eitt, sum nú liggur fyri, er at gera nýggjan køk í húsinum.

Húsini eru góðkend av brunaumsjónini, og øll loyvi, sum krevjast til slíkt virksemi, sum er í húsinum, eru fingin til vega.

Steingrím Haraldsen sigur, at nú hann hevur verið at kalla einsamallur um hetta øll hesi árini, eru løtur, tá hann hugsar um, hvørt hann skal halda fram ella ikki. Men enn hevur hann so ikki gjørt av at gevast.

– Kærleikin til arbeiðið og tað virksemi, felagið stendur fyri, er sera sterkur, so enn kann alt henda, sigur Steingrim Haraldsen.